**KOYRIKORT?**

Hugsar tú um at ogna tær koyrikort til persónbil so er møguleikin her.
Nýtt hold byrjar 17. oktober.
Tilmelding á fartel 73 74 75

Postboks 133, 110 Tórshavn,
www.koyrilararin.fo

★★★ ★★★
**KOYRILÆRARIN**
/Benny Ejdesgaard

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 100,** P/F Elektron, 110 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 30.03.2005
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Jørn Astrup Hansen, Heygsbreyt 4, 100 Tórshavn (nevndarformaður)
**Farin frá sum næstformaður:** Peter Marner Aage Jacobsen, Vørðubrekka 3, 160 Argir
**Innkomin í nevndina:** Janus Eyðun Petersen, Varðabú 1, 100 Tórshavn (næstformaður)
Eyðfinn Reyðberg, Jørundsgøta 25, 700 Klaksvík (nevndarlimur)
**Innkomin sum nevndarformaður:** Peter Marner Aage Jacobsen, Vørðubrekka 3, 160 Argir
**Endamál:** Endamál felagsins er at menna, útvega og reka KT-skipanir og aðra vinnu í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 06. oktober 2005*

*Kristin Balle*

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin, tann 4. november 2005, kl. 13.00** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir bygning nr. 1 á leigaðum øki **matr. nr. 137 b, Skálavík** (virkisbygningurin hjá Sp/f LIDO SEAFOOD undir konkurs), 220 Skálavík, umframt yvir virkistilhoyr, sum verður uppróspt fyri seg. **(AS nr. 2-44/2004)**

Ognin er ein bygningur í tveimum hæddum, veghædd og partvís innrættað loftshædd, gjørdur úr betong og taktur við aluminium. Grundøki er 910 m². Bygdað øki er 850 m². Fiskavirkið er innrættað við móttøkuhøll, fillethøll, reinskerihøll, liðugtvøruhøll, 2 frystirúm. Parallelt við høllirnar eru 2 køkar við kølirúmum. Harumframt er skrivstova og kantina. 4 klæðingarrúm við 8 brúsum og toilettum. Loftið er innrætta til emballagur. Fabrikkin hevði góðkenning bæði til high- og law-risk produktir. Virkistilhoyrið umfatar m.a. FJM reinskerilinju 12 prs., Marel einultbara portiónsmaskinu, Marel gradara, djúptreks vakum maskina, Marel grader til liðugtvøru.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Julionnu Klett, advokati, Bringsnagøta 21, 100 Tórshavn, tlf. 311744, (j. nr. 88826)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Søluuppgerð kann fáast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur,
tann *06. okt. 2005*

**LEIGA AMBOÐ & MASKINUR**

**Kaj Andreasen & Co**
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

# Heilsuhjálpari

Runavíkar kommuna søkir eftir heilsuhjálpara til **Heimið á Mýrunum** í Runavík.

Talan er um tíðaravmarkað starv í niðursettum brøki, 0,4875, frá 1. november til 30. apríl 2006. Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

**Krøv:**
- hevur prógv og góðkenning sum heilsuhjálpari
- hevur áhuga fyri røkt av minnisveikum fólkum
- hevur hug og hegni at vera um minnisveik fólk
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin eftir tørvinum hjá búðfólkunum
- er nýhugsandi og hevur hug og árræði at skipa fyri dagligum virksemi fyri tey minnisveiku

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt starvsumhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og verða við til at menna umsorgan og røkt
- góða innleiðslu
- undirvísing
- góðar møguleikar til at brúka tíni skapandi og ígongdsetandi evni
- eitt heimligt og hugnaligt umhvørvi, hvar ið hvør einstakur kann kenna seg væl

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála ímillum Heilsuhjálparafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Maibritt Jacobsen, leiðara á tlf.448034 ella 477080.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:

**Heimið á Mýrunum**
Mýravegur 26
620 Runavík

**Umsóknarfreist:** 25. oktober 2005

RUNAVÍKAR KOMMUNA



**ÚTBERARAR**

**Ert tú yvir 13 ár**
so hevur tú møguleikan at vinna eina góða inntøku.
Vit søkja nevniliga eftir fólki, at bera út á Eiði.

**Ert tú tann rætti/rætta til okkum?**
So ring á tel. 35 14 05 frá kl. 10 - 17 ella send ein teldupost : utbering@prent.fo

DIMMALÆTTING • 341200

PRENTMIÐSTØÐIN
Smyrilsvegur 13
Postboks 3314
FO-110 Tórshavn

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ Starvsfólkadeildin

# Sjúkrarøktar-frøðingur

Á D3 er eitt farloyvisstarv á starvsbrøki 0,7 í skiftandi vaktum leyst at søkja frá 1. november 2005 til og við 30. september 2006.

Deildin er ein stutt- og langtíðar psykiatrisk deild, har arbeitt verður eftir miljøterapeutiskum meginreglum og kontaktpersónsskipanini. Arbeitt verður fram móti at geva sjúklingunum økt sjálvbjargni og við tíðini møguleikan at flyta í egna íbúð. Deildin er í støðugari menning. Har starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og almanna- og heilsuatstøðingar í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar.

**Krøv til umsøkjaran:**
- góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- royndir og áhuga innan psykiatri
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- góða innleiðslu

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja til Elsebeth Sørensen, deildarleiðara, telefon 30 45 00 lokal 4003 ella Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, e-post: bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 25. oktober 2005 kl. 12.00. *Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

Skivlig umsókn, merkt »umsókn til starv«, við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

# Kunngerð

**frá útskiftingarnevndini fyri Eiðis bygd.**

Eftir lóg n. 147 frá 27. mars 1939, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund hósdag 27. oktober k. 10 í EB-húsinum á Eiði.

Til viðgerðar verður útskifting v matr. nr. 436, Sunnanmanshagi, Eiðis bygd.

Nevndarlimir eru Marita í Brekkunum, Hósvík og Jørleif Kúrberg, Tórshavn.

N.v.
**Øssur Á. Midjord**
útsk. form.

MATRIKULSTOVAN 1948